## Ajax tapti toppdyst

Stórfelagið Ajax, sum fyri viku síðani setti PSV upp á pláss, mátti lúta í dystinum ímóti AZ Alkmaar um vikuskiftið. Talan var um toppdyst í hollendsku landskappingini, og við sigrinum legði Alkmaar seg á odda í kappingini. Alkmaar vann dystin, sum var spældur á leikvøllinum hjá Alkmaar, 2-0, og málini skoraðu Demy de Zeeuw og brasilski Ari.



## Flemming venur nú Kyndil

Í farnu viku boðaði Kyndil frá, at Hannis og Uni Wardum vóru komnir ásamt við leiðsluna í felagnum um, at teir báðir ikki longur skuldu venja besta kvinnuliðið hjá felagnum. Og longu undan vikuskiftinum varð avgerð tikin um, at nýggjur maður í sessinum verður Flemming Raben. Flemming hevur áður virkað sum venjari hjá Kyndli, Neistanum og H71, umframt at hann eisini hevur verið hjá føroyska kvinnulandsliðnum í hondbólti.

Tjaldur-Kyndil 34-17 (17-11):

# Tjaldur flýgur høgt

**Tjaldurs-kvinnurnar halda framvegis fast í oddaliðunum. Sunnudagin gekk Kyndil einki gjørt fyri at steðga uppflytarunum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað var lítið at gera hjá Kyndils-verjuni, tá Adina Petrea og hinir stóru skjúttarnir hjá Tjaldri fóru upp*

*Mynd: Johnny Lamhauge*

Hóast tær júst eru fluttar upp aftur í bestu kvinnudeildina, so hevur Tjaldur veruliga bitið frá sær í vetur.

Sunnudagin tóku tær móti Kyndli, og her var eingin sum helst ivi um, hvønn vegin sigurin skuldi fara. Frá fyrsta bríksli var tað Tjaldur, sum setti dagsskránna, og longu eftir einum korteri var munurin komin upp á seks mál.

Og so var spurningurin bara, hvussu stórur sigurin skuldi verða. Kyndil fekk ikki gjørt tað heilt stóra fyri at steðga sterku skjúttunum hjá Tjaldri, sum veruliga fingu skotið fyri seg hendan dagin.

Sigurin ber við sær, at Tjaldur nú bert er tvey stig frá Stjørnuni, sum er nummar tvey í kappingini. Og so fara teir báðir næstu dystirnir at vísa, hvussu langt Tjaldur kann røkka í kappingini við tey fremstu liðini. Komandi umfarið skulu kvinnurnar úr Runavík spæla á útivølli móti Neistanum, og eftir hetta verður tað á útivølli móti Stjørnuni, at uppflytararnir skulu royna seg.

Hjá Kyndli ræður fyrst og fremst um at fanga StÍF aftur. Og nú hevur nýggi venjari so tríggjar vikur til at fyrireika liðið til vitjan á Skála.

### FAKTA um dystin

**Tjaldur-Kyndil 34-17 (17-11):**
**10 min:** 6-3
**20 min:** 12-7
**40 min:** 22-14
**50 min:** 27-18
**Málskjúttar**
**Tjaldur:** Heidi Sevdal 7, Pátru Marinela 7(5), Adina Petrea 6, Alina Olaru 6, Annika Thomsen 6, Benedikta Johannesen 1, Jóhanna í Króki 1
**Kyndil:** Jacklin Durhuus 5(2), Ása Christiansen 3, Barbara Egilstrøð 3, Jórun Ludvig 2, Ronja M. Mikkelsen 2, Halla Midjord 1, Rakul N. Joensen 1
**Brotskøst:** Tjaldur 6, Kyndil 2
**Útvísingar:** Tjaldur 1, Kyndil 2
**Dómarar:** Hanus Kúrberg & Hans Thomassen

VB-StÍF 34-22 (17-9):

# VB einsamalt á odda

**Við tryggum sigri á StÍF gjørdi VB sær dælt, tá Stjørnan snávaði móti Neistanum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

VB er nú í førarasetrinum í føroyskum kvinnuhondbólti. Seinnu árini hevur tað annars verið Stjørnan, sum hevur sitið á hondbóltstrónuni, men sunnudagin traðkaði VB upp á ovastu rók fyri fyrstu ferð í trý kappingarár.

Sigurin móti Stjørnuni fyri viku síðani prógvaði, at VB er ført fyri at stríðast heilt frammi í oddinum í vetur, og tann pástandin fekk StÍF ikki gjørt tað heilt stóra við.

VB var stórfavorittur undan dystinum, og eftir eitt korter ella so prógvaðu tær eisini, hví so var.

StÍF hevði annars fylgt hampuliga væl við fyrstu løtuna, men tá heimaliðið setti ferð á, kom munurin veruliga til sjóndar. Uttan at kveita aftur um bak, løgdu tær á heimaliðnum sjógv millum seg og mótstøðuna, og eftir hetta var ongan tíð nakar sum helst ivi um, at talan skuldi verða um heilt greiðan heimasigur.

Eftir steðgin hevði VB ikki heilt somu ferðina á spælinum, men ivin um úrslitið gjørdist ongan tíð tann stóri. Og tað gjørdi sjálvandi ikki lagið verri, tá boðini bórust úr Havn um, at Neistin hevði tikið stig frá Stjørnuni.

Tað hevði nevnliga við sær, at VB nú er einsamalt á odda í Sunset-deildini. Og tó at kappingarárið enn er ungt, so er tað nú ikki tann ringasta støðan at standa í.

### FAKTA um dystin

**VB-StÍF 34-22 (17-9)**
**10 min:** 4-4
**20 min:** 10-7
**40 min:** 21-15
**50 min:** 29-18)
**Málskjúttar**
**VB:** Daiva Toumaite 11(3), Bára Mortensen 7, Auske Vysniaskaite 4, Gurið Mortensen 4, Rannvá Johannesen 3, Laila Jespersen 1, Una Egilsdóttir 1, Sára Samuelsen 1, Monika Samuelsen 1, Svava Vestergaard 1
**StÍF:** Rebekka Justinussen 10(4), Fríðrún Danielsen 5, Bára Berthelsen 5, Anna Petersen 1, Unn Hermansen 1, Ásgerð Káradóttir 1
**Brotskøst:** VB 3, StÍF 5
**Útvísingar:** VB 3, StÍF 2
**Diskvalifikatión:** VB 1 (beinleiðis reytt)

